# Fuglar í Viðarlundini í Havn

Í samband við undirvísingina í almennari vistfrøði, taldu næmingar á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum fuglar í Viðarlundini í Havn í tíðarskeiðinum 1. til 23. februar 2005. Hetta tíðarskeiðið vóru sædd tilsamans 13 fuglasløg. Millum hesi vóru jarðarkona, krikkont, bringureyði og títlingskongur.


Mynd: Lars Larsen Black.

Svanir í Viðarlundini í Havn.

Viðarlundin í Havn er eitt satt paradís hjá børnum og barnafamiljum. Hvønn dag síggjast nógv fólk ganga túr í Viðarlundini: Barnagarðsbørn stetlandi á sínum smáu beinum. Vøggustovubørn í barnavogni. Ommur, sum eru úti og lufta hundinum, og mammur og pápar, sum eru sunnudagstúr saman við teirra smáu alvum. Øll steðga vit á við dunnuhylin. Skimast og gleðast um dunnurnar, sum koma stimandi ímóti tær og vænta sær ein breyðbita, eitt skons ella okkurt annað leskiligt, sum tú hevur ruddað undan breyðskápinum har heima, men sum var blivið heldur turt til tín egna munn.

Ímeðan kanst tú njóta útsýnið og hoyra fuglarnar láta í trøunum rundan um teg: Gráspurvar, starar, dúgvur, turkadúgvur og kvørkveggjur. Hesa gleðina havi eg havt nógvar ferðirnar tey seinastu tíggju árini, men hvussu nógvir fuglar munnu veruliga vera í Viðarlundini? Henda spurningin ynskti eg at fáa greiðu á.

Dagliga undirvísi eg lívfrøðisnæmingum á Fróðskaparsetrinum. Várhálvuna í 2005 skuldi eg undirvísa íalmennari vistfrøði. Vistfrøði er læran um, hvussu dýr og plantur húsast í náttúruni. Her verður millum annað komið inn á, hvørji sløg finnast í einum øki, hvussu nógv er til av teimum ymisku sløgunum, og hvussu hetta broytist við tíðini. Tað var tí upplagt at fáa lívfrøðisnæmingarnar at eygleiða fuglarnar í Viðarlundini sum part av undirvísingini. Á hendan hátt fingu teir høvi at læra fuglarnar at kenna og fingu eisini eina hóming av, hvussu vísindafólk arbeiða, tá tey ikki sita inni á skrivstovum og hyggja inn í eitt telduskerm.

## Fuglateljingin

Tankin var gjørdur til veruleika. Næmingarnir skuldu arbeiða saman tveir og tveir. Teir fingu 4 spurningar, sum teir skuldu svara:

- Hvørji fuglasløg eru í Viðarlundini í Havn?
- Hvussu síggja tey út?
- Hvar í Viðarlundini halda tey til?
- Hvussu nógv er til av teimum ymisku sløgunum?

Í uppgávuni skuldu næmingarnir gera eina lýsing av teimum ymisku fuglasløgunum: Hvussu fuglurin sá út, hvussu vorðin og hvussu stórur hann var. Eisini skuldu tey koma við eini meting um, hvussu nógv var til av teimum ymisku fuglasløgunum í Viðarlundini.

So varð farið til verka. Næmingarnir vóru rættulig ágrýtnir. Vápnaðir við pappíri, blýanti og onkuntíð eisini við kikara gingu teir túrar




Kort yvir Viðarlundina í Havn.

| Fuglaslag | Latínska navnið | Tal í miðal | Lægsta tal | Hægsta tal | Hvussu ofta fuglurin er sæddur | Títtleiki (%) | Stovnsmeting |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Krikkont | *Anas crecca* | 2,0 | 1 | 3 | 28 | 97 | 2 |
| Villdunna | *Anas platyrhynchos* | 126,1 | 50 | 204 | 29 | 100 | 150-180 |
| Bládúgva | *Columba livia* | 5,6 | 1 | 13 | 14 | 48 | 10-15 |
| Kráka | *Corvus corone* | 2,6 | 0 | 9 | 22 | 76 | 8-10 |
| Svanur | *Cygnus cygnus* | 2,0 | 2 | 2 | 29 | 100 | 2 |
| Bringureyði | *Erithacus rubecula* | 1,2 | 1 | 2 | 14 | 48 | 2 |
| Gráspurvur | *Passer domesticus* | 10,9 | 1 | 60 | 25 | 86 | 20-30 |
| Jarðarkona | *Rallus aquaticus* | 0,9 | 0 | 2 | 17 | 59 | 1-2 |
| Títlingskongur | *Regulus regulus* | 1,2 | 1 | 2 | 6 | 21 | 2 |
| Turkadúgva | *Streptopelia decaocto* | 7,1 | 1 | 18 | 29 | 100 | Uml. 20 |
| Stari | *Sturnus vulgaris* | 7,8 | 0 | 46 | 23 | 79 | 30-50 |
| Óðinshani | *Turdus iliacus* | 4,2 | 1 | 10 | 9 | 31 | Uml. 10 |
| Kvørkveggja | *Turdus merula* | 6,1 | 2 | 13 | 28 | 97 | Uml. 20 |

Talva: Tilsamans 13 fuglasløg vóru sædd í Viðarlundini í tíðarskeiðinum 1.-23. februar 2005. Á hvørjum túri var talt, hvussu nógvir fuglar vóru sæddir. Í talvuni er víst, hvørji fuglasløg vóru sædd, og hvussu nógvir fuglar vóru sæddir í miðal av hvørjum slagi, umframt minsta og størsta talið, ið sætt var á teimum 29 túrunum. Eisini er uppgivið, hvussu ofta fuglurin varð sæddur á teimum 29 túrunum, og hvat hetta svarar til í %-um. Í seinastu súluni er gjørd ein meting av, hvussu nógv var til at hvørjum fuglaslagi hetta tíðarskeiðið.

í Viðarlundini bæði tíðliga og seint. Teir 23 dagarnar, kanningin vardi, vóru teir tilsamans 29 túrar í Viðarlundini, har teir skrivaðu upp, hvat tey sóu.

**Úrslitini**

Tá úrslitini vóru savnað saman, høvdu tey sæð 13 ymisk fuglasløg. Tann vanligasti fuglurin var, sum væntað, villdunnurnar, sum fyri tað mesta halda til í dunnuhylinum mitt í Viðarlundini. Mett varð, at okkurt um 150-180 villdunnur hildu til har hesar dagarnar, kanningin var gjørd. Eisini starar og gráspurvar taldust millum tey vanligastu fuglasløgini hesar dagarnar.

Úrslitini frá kanningini eru víst í talvuni niðanfyri. Eisini er ein lýsing av nøkrum av teimum sjaldsamaru fuglunum, sum vóru sæddir.

Nú kann onkur kanska halda, at 13 fuglasløg í Viðarlundini ikki er serliga nógv. Og tað er tað heldur ikki. Men havast skal í huga, at kanningin varð gjørd á hávetri, tá flestu fuglarnir eru flýddir suður til heitari lond. Um summarið er talið av fuglasløgum í Viðarlundini munandi hægri, men hvussu nógv fuglasløg halda til har um summarið, vita vit ikki. Heldur ikki, hvussu nógv er til av teimum ymisku sløgunum. Men tað kann ein komandi kanning við einum øðrum lívfrøðisliði á Fróðskaparsetrinum kanska greiða okkum frá eina aðru ferð.

**Sjáldsamir fuglar**

**Jarðarkona** er lítil og dimmur fuglur; uml. 23-28 cm. til støddar. Eitt sereyðkenni hjá jarðarkonuni er tað langa og eitt sindur boygda reyða nevið. Annars er fuglurin svartur og morreyður um bakið. Grábláur um bringuna og undir búkinum. Svartar og hvítar rípur um liðirnar. Hon er sera løtt á beinunum og reikar støðugt aftur og fram, meðan hon leitar eftir føði í moldini. Jarðarkonan helt til úti á hólminum í ovara dunnuhylinum, men annars eru tær av og á at síggja uppi við brúnna við Hvíldarheimið Naina, har Havnará rennir inn í Viðarlundina. Jarðarkona er flytifuglur í Føroyum, men kann eisini verða sædd her um veturin. Tær eru tó altíð fáar í tali.









**Krikkont** sæst javnan í Føroyum og eigur eisini við hvørt her. Hon er heldur minni enn villdunna: uml. 34-38 cm til støddar. Hon er minsta ontin í norðurhøvum. Steggin er brún- og hvít sprøklutur um kroppin við eini hvítari rípu eftir síðuni. Upp undir mintin er hann gullittur. Høvdið er korkareytt og grøn, við nøkrum hvítum rípum. Nevið er dimt gráligt. Bøgan er ikki so litrík sum steggin – brúnligt sprøklut um alla kroppin, tó ljósari um búkin. Hon hevur ein grønan spegil á veingjunum við hvítari rond. Nevið er dimt gráligt. Krikkantarparið helt til í dunnuhyljunum. Sum oftast tí ovara, men við hvørt vóru tey í niðara hylinum. Tann eina dagin vóru 2 pør at síggja. Tær høvdu lyndi til at halda seg eitt sindur fyri seg sjálva. Tær vóru friðarligar og ofta einsamallar í tí niðara hylinum. Krikkont er vanlig at síggja í Føroyum, men eigur sjáldan her. Fimm pør eru tó skrásett at hava átt í Føroyum.

**Bringureyði** er lítil og rundvaksin smáfuglur; umleið 14 cm til støddar. Hann er gulreyður um ennið og næstan niður á búkin. Hetta er eitt sereyðkenni fyri hann. Høvdið, bakið og veingirnir eru morreyð. Undir búkinum er hann ljósagráur. Nevið er dimt. Bringureyði sæst regluliga í Føroyum, men bert eitt par er skrásett at hava átt.

**Títlingskongur** er minsti fuglur, vit kenna í Føroyum; hann er uml. 9 cm. til støddar. Títlingskongur er støðufuglur ella flytur stuttan veg. Steggin er gulur/reyðgulur um skallan, við svørtum jaðara uttanum, men bøgan er bara gul um skallan við svørtum jaðara uttanum. Bringan og búkurin eru grálig, og bakið er grønligt. Á veingjunum ber hann tvær breiðar rípur, ið eru dimmar á liti. Hann letur ógvuliga hart og snjalt. Hesi seinastu árini er títlingskongur vorðin alt meira vanligur í Føroyum. Fleiri enn 10 pør eru skrásett at hava átt í Føroyum.

*Eyðfinn Magnussen*
*Biologur, Fróðskaparsetur Føroya.*

F R Á G R E I Ð I N G

# Føroya Fuglafrøðifelag

BirdLife International



- Formaðurin skrivar
- Bringureyði
- Samrøða við Mikal Kyrjarheygg
- Tríggjar yrkingar um fuglar eftir Mikal Kyrjarheygg
- Gráspurvurin í Føroyum
- Túrur eystur í Barm
- Túrur á Sandoynni
- Toftavatn
- Føroyar, sæð frá einum svenskum sjónarmiði
- Fuglar í Viðarlundini í Havn
- Sandoyartunnilin er ein hóttan ímóti fuglinum, tí tá koma rotturnar
- Parlag og uppfostran hjá Músabróður
- www.FaroeNature.net

1
2006
20. árg.